Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar Øki

# 4 størv á Toll- og Skattstovu Føroya Streymoyar øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru 2 størv leys at søkja til setan 1. juni 2000 ella so skjótt til ber og 1 avloysarastarv/hjálparastarv við kassan til setan frá nú og til ársenda 2000.

### 2 føst størv umframt 1 avloysarastarv

**Arbeiðsuppgávur:**
Málsviðgerð innan skatt, mvg, toll og innheinting.

**Førleikakrøv:**
Fyrimun hava umsøkjarar, ið hava lokið HH-prógv, merkonom e.l., ella hava aðra viðkomandi útbúgving og royndir innan almenna ella privata umsiting. Viðkomandi, ið settur verður, skal helst hava kunnleika til teldu á brúkarastøði, og hava góð evnir at orða seg bæði skrivliga og munnliga. Harumframt skal viðkomandi kunna arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og vera arbeiðssamur.

**Útbúgvingar- og eftirútbúgvingarmøguleikar:**
Toll- og skattstovan bjóðar starvsfólkunum ymsar innanhýsis útbúgvingar. Møguleiki er eisini at útbúgva seg uttanhýsis við ávísum stuðli frá stovninum. Kravt verður at viðkomandi, ið settur verður, luttekur í øllum viðkomandi innanhýsis útbúgvingum, og helst eisini í viðkomandi uttanhýsis útbúgvingum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn og setanarviðurskiftir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsroyndum frá øðrum starvi/størvum. Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara. Tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

### 1 avloysari/hjálparfólk til kassan

**Arbeiðsuppgávur:** Vanligt kassaarbeiði, inn- og útgjøld umframt annað arbeiði í sambandi við kassan.

**Førleikakrøv:** Umsøkjarar við kunnleika til kassa/avgreiðsluarbeiði hava fyrimun. Viðkomandi verður harumframt upplærdur á staðnum.

**Lønar- og setanartreytir:** Setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og lønin eftir 15. lønarflokki í sama sáttmála.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, møguligum ummælum og upplýsing um starvsroyndir skulu sendast innan 26. mai 2000 til:

**Toll- og Skattstovu Føroya**
**Streymoyar Øki**
**Postboks 3139**
**Smyrilsvegur 7**
**FO 110 Tórshavn**

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Streymoyar øki, Eyðfinn Hansen, økisstjóra á tlf. 310260.

**Um Stovnin**
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og Tórshavn, røkja raksturin. Í Streymoyar øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast í løtuni 55 fólk.

# Klaksvíkar Kommuna

## skipar nú Sosialu Deild av n‡ggjum

**Klaksvíkar B‡rá› hevur avgjørt at styrkja sosialu umsitingina vi› 2 n‡ggjum størvum, sum her ver›a l‡st leys at søkja. Samstundis ver›a 2 av verandi størvum innan málsøki› – sosialrá›gevarin hjá Barnaverndarnevndini og stu›ulsrá›gevin – uppnorméra›i til ávikavist fulla og hálva tí›.**

**Sosiala Umsitingin skal húsast á 2. hædd í b‡rá›shúsinum, har omanfyri nevndu 4 starvsfólk – umframt lei›arin av Klaksvíkar Kommunalu Dagrøkt – koma at hava skrivstovu.**

### Samskipari av barnaansingarøkinum

Frá í ár yvirtekur kommunan alla umsitingina av barnaansingarøkinum. Í tí sambandi ver›ur eitt n‡tt starv sum samskipari/rá›gevi innan ansingarøki› l‡st leyst:

**Arbei›i›:**

**Arbei›søkini eru m.a.:**
- Dagstovnar
- Kommunala Dagrøktin

**Arbei›suppgávurnar eru m.a. at:**
Vi› tilvísing til lei›aran av sosialu deild hava ábyrgd av og syrgja fyri, at
- evna ein politiskan og fakligan málsetning og at virka fyri, at hesin ver›ur fylgdur
- vera bindili› millum stovnarnar og umsitingina
- samskipa virksemi› hjá stovnunum
- samskipa skei›virksemi› innan ansingarøki›
- vera rá›gevi hjá stovnslei›arunum
- samskifta og samstarva vi› foreldur
- samskipa bí›ilistarnar innan ansingarøki›
- røkja ávísar skrivstovuuppgávur

**Vit sóknast eftir persóni, i›:**
- kann arbei›a sjálvstø›ugt
- kann virka í gó›um samtarvi vi› starvsfelagar
- kann virka sum sparringspartnari hjá stovnslei›arunum og sosialu deild
- hevur vir›ing, fatan fyri og vilja at samstarva vi› politisku skipanina
- dugir at samskifta

**Útbúgving/royndir:**
- námsfrø›iliga ella líknandi útbúgving

Umsitingarligar royndir og kunnleiki innan EDV kunnu vera ein fyrimunur.

**Setanarvi›urskifti:**
Treyta› av landsst‡risins gó›kenning ver›ur starvi› sett skjótast tilber.
Løn og setanarvi›urskifti sambært sáttmálan millum Fíggjarmálast‡ri› og avvar›andi yrkisfelag.

### Lei›ari av Sosialu Deild

**Høvu›suppgávur:**
- at hava lei›sluna og ábyrgdina av deildini
- at samskipa arbei›i› á deildini
- at skipa eina neyva fíggjarst‡ring
- í samstarvi at evna ein politiskan og fakligan málsetning fyri sosialu deild og at virka fyri, at hesin ver›ur fylgdur
- at vera skrivari hjá og samstarva vi› Sosialu Nevnd
- at samskipa skei›virksemi innan øki›
- av hava samrø›ur vi› vi›skiftafólk hjá deildini
- at samskifta vi› almennar myndugleikar

**Vit sóknast eftir persóni, i›:**
- kann ganga á odda
- dugir væl at fyrisita/lei›a
- dugir at arbei›a sjálvstø›ugt
- kann virka í gó›um samstarvi vi› starvsfelagar og eggja teimum at menna tænastustø›i›
- dugir væl at samskifta, bæ›i innan- og uttanh‡sis
- hevur vir›ing, fatan fyri og vilja at samstarva vi› politisku skipanina

**Útbúgving/royndir:**
- Sosialrá›gevi ella onnur vi›komandi útbúgving

Royndir innan lei›slu og umsiting og kunnleiki til EDV kunnu vera ein fyrimunur.

**Setanarvi›urskifti:**
Starvi› ver›ur sett skjótast gjørligt.
Løn og setanarvi›urskifti sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálast‡ri› og avvar›andi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita** vi› at venda sær til John Færø b‡rá›sskrivara, telefon 456388.

**Umsókn** saman vi› vi›mælum og uppl‡singum um útbúgving og royndir skulu vera

**Klaksvíkar Kommunu,**
**Postboks 2, 700 Klaksvík**

í hendi í seinasta lagi 22. mai 2000.

Klaksvíkar B‡rá›

**Robustar blandimaskinur**

- Tvangsblandarir 38–800 ltr.
- Blandimaskinur 130 – 180 ltr.
- Breitt úrval av stav og bjálka-vibratorum

Fáast við el, bensin ella dieselmotori

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

ARBEIÐSKLÆÐIR • MÁLING
SJÓKLÆÐIR 66° n • BÚNÝTI
*Handilin er fullur av nýheimkomnari vøru*

**AMBOÐ & BÚNÝTI**
**v/J. H. Joensen**
Miðvágur • Tel. 333555 • Fax 333851

Sosialurin - 311820



# Sløkkiliðsmaður

**Til sløkkiliðsstøðina hjá Tórshavnar býráð verður søkt eftir sløkkiliðsmanni.**

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvðusuppgávunum hjá sløkkiliðsmanninum verða m.a.
- viðlíkahald av sløkkiliðsútgerð á støðini
- eftirlit við og viðlíkahald av brandpostum
- bjargingaruppgávur
- annað vanligt brandmansarbeiði og hjálpiuppgávur
- bilførari á MBF-bussinum
- luttaka í arbeiðinum á verkstaðnum

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg við átekning til vinnuligan fólkaflutning. Tann starvssetti skal, um hann/hon ikki hevur víðkað fyrstuhjálparprógv og prógv frá góðkendum sløkkiliðsskúla, hava útvega sær hetta innan eitt ár er farið.

Neyðugt er, at viðkomandi er likamliga væl fyri, er førur fyri at taka tær røttu avgerðirnar í røttu løtuni, kann arbeiða sjálvstøðugt og duga væl at virka saman við starvsfelagum og viðskiftafólkum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast tilber og lønt eftir sáttmála millum Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag og Tórshavnar kommunu. Setanin er tó treytað av góðkenning frá Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Peter Seloy, støðleiðara, ella Kartna Jacobsen, varastøðsleiðara, á tlf. 314881

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar sløkkilið, Postboks 3240, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. mai 2000. Merk umsóknina “Sløkkiliðsmaður”

# Verkstaðsfólk

**Til verkstaðið hjá Tórshavnar býráð verður søkt eftir dugnaligum verkstaðsfólki.**

**Vit bjóða**
Eitt starv við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við sera góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvðusuppgávunum hjá verkstaðsmanninum verða m.a.
- sveisiarbeiði innan og uttandura
- umvæling av maskinum, tólum o. t.
- annars vanligt smiðjuarbeiðið

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar, er handaligur, hevur prógv og drúgvar royndir innan sveisiarbeiði og hevur fyrstahjálparprógv. Royndir innan maskinsmíð er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála millum Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag og Tórshavnar kommunu. Setanin er tó treytað av góðkenning frá Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Peter Seloy, støðleiðara, ella Símin Jákup Hansen, verkstaðsleiðara, á tlf. 319243

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar sløkkilið, Postboks 3240, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. mai 2000. Merk umsóknina “Verkstaðsmaður”

Tórshavnar kommuna

# Arbeiðsformaður

**Søkt verður eftir arbeiðsformanni til kloakk- og vegdeildina hjá Tórshavnar kommunu at byrja skjótast gjørligt.**

**Arbeiðið**
Arbeiðsformaðurin kemur, undir leiðslu av teknisku deild, at standa fyri ymiskum veg- og kloakkarbeiðum hjá Tórshavnar kommunu. Arbeiðsformaðurin skal leiða og samskipa arbeiðið á arbeiðsplássinum saman við verkfrøðingum á teknisku fyrisitingini. Harumframt kemur arbeiðsformaðurin at luttaka á relevantum fundum á teknisku fyrisitingini.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava relevanta útbúgving umframt koyrikort. Neyðugt er at viðkomandi, ið verður settur, kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka skjótar og rættar avgerðir. Umsøkjari við kunnleika til veg- og kloakkarbeiði hevur fyrimun. Ynskiligt er at viðkomandi hevur kunnleika til dáta, so sum tekstviðgerð og rokniark.

**Lønarviðurskifti**
Starvið, ið verður sett skjótast tilber, er fulltíðarstarv og verður lønt eftir avtalu.

**Meir fæst at vita**
við at seta seg í samband við J. Sofus Hansen á teknisku deild ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing, á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. mai 2000. Viðmerk á umsóknina "Arbeiðsformaður".

Tórshavnar kommuna

# PASS

**Umsókn fæst á Fútaskrivstovuni í Tórshavn og á øllum politistøðum uttan fyri Tórshavn**

Skjøl at hava við tá pass verður umbiðið:
Gamla passið
Navnaseðil og møguligt vígslubræv
Nýggja mynd

Passið skal gjaldast tá tað verður umbiðið:
kr. 400,- fyri pass til persónar, sum fyltir eru 18 ár og ikki eru fyltir 67 ár
kr. 150,- fyri pass til persónar undir 18 ár og til persónar 67 ár og eldri

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fútaskrivstovuna – tlf. 31 55 33 – ella politistøðirnar.

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram á Fútaskrivstovuni í Tórshavn.**

**Vinarliga biðið um passið í góðari tíð.**

**Føroya Landfúti,** *tann 9. mai 2000*
**M. Nepper-Christensen**

**Frá Javnaðarflokkinum**

**Floksleiðslufundurin**
er útsettur til 20. mai kl. 10.00 á Hotel Hafnia

**Javnaðarflokkurin**

# Íbúð til sølu

**Vesturgøta nr. 9, 1. hædd t.v.**

63 fermetrar, kjallararúm 16 fermetrar. Bert um hóskandi boð fæst. Hóskandi boð kr. 775.000.

**Tlf. 32 12 48 ella 21 12 60**

# Sjúkrakassin er stongdur

vegna feriu frá 17. mai til 28. mai. Báðir dagar íroknaðir.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**

## Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fær hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fær eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820